# Fiskimálaráðið

**Lógartænastan**

Dagfesting: 08-04-2019
Mál nr.: 18/00606-47
Málsviðgjørt: HJ-TVR/KM
Eftirkannað: Lógartænastan dagfestir

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um at bjóða út rættindi á uppboðssølu í 2019**
(Hækking í nøgd av svartkjaftarættindum og sildarættindum og nýggj áseting um at fiska í íslendskum sjógvi)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 5 frá 17. januar 2019 um at bjóða út rættindi á uppboðssølu í 2019, sum broytt við kunngerð nr. 13 frá 27. februar 2019, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 12, stk. 2 verður orðað soleiðis:

“*Stk. 2.* Hvørt boð skal tilskila, hvørja nøgd í kilo tann, ið bjóðar, er áhugaður í at keypa og hvønn prís í krónum og oyrum fyri kilo, hann er til reiðar at gjalda fyri hesa nøgd.”

**2.** Í § 16 a, stk. 2 verður “19.552 tons” broytt til: “22.002 tons”.

**3.** Í § 16 c, stk. 2 verður “18.261 tons” broytt til: “21.574 tons”.

**4.** Aftan á § 16 d, men áðrenn yvirskriftina yvir § 17, verður sett:

“**§ 16 e.** Nøgdirnar, bjóðaðar út sambært §§ 16 a og 16 c, kunnu eisini fiskast í íslendskum sjógvi.”

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, dagfesting

**Høgni Hoydal**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert